# Kveistursmølur

## *Amblyptilia punctidactyla*

Kveistursmølur er bert fangaður eina ferð í Føroyum. Tað var tann 29. sep. í 2001, tá ið Jens-Kjeld Jensen fangaði ein kallmøl í Nólsoy. Kveistursmølur má roknast fyri at verða tilvildarligur gestur í Føroyum. Flogkyktið er avmyndað livandi.



*Nærmynd av øðrum veinginum. Her sæst rættiliga væl, hvussu nógv hann líkist einum kveistri, sum navnið á honum eisini sipar til. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen©).*



*Kveistursmølur. Flogið fevnir 19 mm. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen©)*

# Gulvongur

## *Xanthia icteritia*

Gulvongur er bert fangaður eina ferð í Føroyum. Tað var tann 23. aug. 2001, tá ið Jens-Kjeld Jensen fangaði ein kvennfirvald í Nólsoy. Gulvongur má roknast fyri at verða tilvildarligur gestur í Føroyum. Flogkyktið er avmyndað livandi.



*Gulvongur. Flogið fevnir 35 mm. (Mynd: Jens-Kjeld Jensen©).*